# eta seg á Strondum



*Ein av fyrstu døgunum verður farið undir at stykkja út her í Lánni á Strondum. – Vit mugu bara staðfesta at stórur áhugi er at búseta seg her á Strondum, sigur Malena Thomsen, borgarstjóri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

sum heldur vilja búgva í eini íbúð.

– Hesum ynskjum vilja vit eisini fegin ganga á møti, sigur Malena. Tað eru nevniliga rættiliga nógv fólk sum spyrja eftir eini slíkari loysn.

Til tess at nøkta eftirspurningin ætlar kommunan ikki bert at stykkja út á Strondum, men eisini á Kolbanargjógv og á Selatrað.

Roknað verður kortini ikki við, at tað í stóran mun bert verða fólk, sum hava ættarbond higani ið velja at búseta seg her.

Men tey skulu kortini fáa grundøki, - tey sum hava áhuga fyri tí!

> Tað eru so mong sum vilja búseta seg her



*Stórur eftirspurningur er eftir bæði grundøkjum, íbúðum og randarhúsum. Sjóvar kommuna ætlar tí at fyrireika eina stóra útstykking í framtíðini – suðureftir og norðurum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Høganes-ætlanin skal kunna rúma sethúsum og øðrum, ið hoyrir til ein tílíkan býling*

*Mynd: nes.fo*

## 800 sethús á Høganesi

**Á fundi á Svangaskarði í oktober mánaði í fjør var rættiliga stórur áhugi var fyri Høganesætlanini, sum Nes kommuna ætlar at seta í verk**

BÚSETING
Snorri Brend

**Toftir:** Á hesum fundinum luttóku Símun Johannesen, borgarstjóri, arkitektarnir Høgni T. Hansen og Anders Abraham og Bogi Jacobsen frá Munin. Her varð kunngjørd ein stór útstykkingarætlan hjá Nes kommunu.

Tað er økið kring Høganes og oman móti Løkinum, sum Nes kommuna ætlar at byggja sethús og íbúðarblokkar á.

Økið er 180.000 fermetrar til støddar, og ætlanin er at umleið 800 fólk skulu búgva í økinum, skrivar heimasíðan hjá Nes kommunu.

Hetta økið hevur higartil ligið sum hagi, men tá prátið um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gjørdist veruleiki, var løtan komin til hesa sera áhugaverdu útstykking.

### Fleiri fyrispurningar

Símin Johannesen vísti á fundinum m.a. á, at kommunan dagliga fær fyrispurningar um grundstykki.

– Síðani Høganesætlanin kom fram í fjølmiðlunum, eru fyrispurningarnir øktir munandi, greiddi hann frá.

Somuleiðis hevur tunnilsætlanin eisini økt um áhugan hjá fólki at fáa grundstykki í Nes kommunu.

Arkitektarnir, Høgni T. Hansen og Anders Abraham fingu til uppgávu at gera útstykkingina og fingu fríar hendur at skapa eitt íbúðarumhvørvi runt Høganes.

Einasta treyt var, at pláss skuldi vera fyri 800 fólkum og øðrum fasilitetum, ið hoyra einum øki til, har fólk skulu búgva, m.a. eitt hotel, skúli, ein ítróttarháskúli og svimjihøll.

### Klárt í vár

Arkitektarnir vístu á, at tað var tann vakra náttúran, sum hevði hugtikið teir í teirra arbeiði.

Teir nevndu Toftavatn og umhvørvið runt vatnið, sum er eitt stórt opið og fjølbroytt landslag við óavmarkaðum møguleikum hjá fólki. Tað er innanfyri vatnið at ætlanin er at gera annan tunnilsmunnan í Skálafjarðartunlinum.

Sethúsini í økinum skulu venda ymiskt í landslagnum, og tað skulu ikki vera nakrar byggilinjur, og húsini skulu laga seg til lendið.

Á fundinum segði Símin Johannesen, at næsta stigið í hjá Nes kommunu verður at gera eina serliga byggisamtykt fyri Høganesøkið.

Síðani skal økið keypast, og tá verður klárt at seta spakan í hálvt ár seinni.